# Páskatúrurin hjá Norrönu útseldur

**Vit hava havt nøkur sera góð Danland tilboð og tað hevur gjørt, at vit hava selt fleiri Danland ferðir enn nakrantíð fyrr, og í løtuni hava vit bert tríggjar 4-mans kahyttir eftir, sigur Henny á Líknargøtu, marknaðarleiðari á Smyril Line**

Leo Poulsen

Páskatúrurin hjá Norrönu er so at siga fullsettur.

– Vit hava túsund ferðafólk umborð á páskatúrinum sum nú er. Hetta er túrurin við fráferð hósdagin 14. apríl, og vit fara at gera nógv burtur úr børnunum á páskatúrinum, sigur Henny á Líknargøtu, marknaðarleiðari á Smyril Line.

Talan verður um eitt heilt nýtt konsept fyri børnini.

– Vit selja sonevnd all-inclusive armbond til børnini, so tey kunnu eta allar máltíðir umborð fyri 199 krónur. Hetta er nakað, sum foreldur hava eftirlýst, tí børn eta ofta ógvuliga lítil, og tá er tað nokk so dýrt hjá foreldrum at gjalda hundrað krónur fyri hvørja máltíð. Við nýggja tiltakinum spara foreldrini einar 400 krónur, sigur Henny á Líknargøtu.

Men eisini í aðrar mátar verður gjørt nógv burtur úr børnunum.

– Spæliplássið er spildurnýtt og alt er uppdaterað inni har, og sum nakað heilt nýtt hava vit eisini føroyskar pedagogar við páskatúrarnar, at taka sær av børnunum og undirhalda teimum á ferðini, sigur Henny á Líknargøtu.

### Broyta Viking Club

Norröna liggur í Klaksvík sum hotelskip meðan North Atlantic Fish Fair stevnan er har, og Smyril Line nýtir høvið at umbyggja Viking Club.

– Norröna er í flestu førum inni so tíðliga á morgni, at fólk yvirhøvur nýta Viking Club lítið sum náttklubba, og tí hava vit gjørt av at geva hølunum eitt lift og broyta tað til eina hugnaliga café, sigur Henny á Líknargøtu.

Meiningin er so at hava kaffi, køkur, sandwichs og vín í caféini.

– Talan er um at gera tveir páskatúrar, tann fyrri verður sum nevnt við fráferð 14. apríl, og hin seinni við fráferð Skírishósdag, 21. apríl. Fyrri túrurin er mest sum útseldur, men tó er tað soleiðis, at um fólk vilja sleppa við, so ber til at keypa couchettupláss. Til seinna túrin eru seldir umleið 500 ferðaseðlar higartil, so har ber enn til at fáa pláss, sigur Henny á Líknargøtu.

Hon sigur, at eini 600 fólk koma upp til Føroya at halda páskir. Tey koma heim við Norrönu, sum fer úr Hirtshals aftur 16. apríl.



*Jenny á Líknagøtu, marknaðarleiðari*

# Havbúnaðarfelagið stuðlar Páli

**SPONSORAVTALA Mánadagin seinnapart skrivaðu Havbúnaðarfelagið og Suðuroyar Svimjifelag við Pál Joensen undir eina eitt ára stuðulsavtalu undir búmerkinum »Salmon fram the Faroe Islands«**




*Havbúnaðarfelagið hevur gjørt stuðulssáttmála við Pál Joensen. Bogi Jacobsen skrivar undir sum formaður fyri Havbúnaðarfelagið og Marlon Kjærbo, formaður í Suðuroyar Svimjifelag við Pál Joensen millum sín*

Mynd: Jens Kristian Vang

Leo Poulsen

Havbúnaðarfelagið er nú høvuðsstuðul hjá Pál Joensen komandi árið.

Felagið hevur seinasta árið arbeitt miðvíst við at menna marknaðarføringstilfar um føroysku alivinnuna. Undir marknaðarføringsheitinum »Salmon from the Faroe Islands« verður føroyskur alifiskur marknaðarførdur í Føroyum og uttanlands.

– Tað er tískil upplagt at brúka møguleikan at marknaðarføra føroyskan laks undir hesum heitinum gjøgnum stuðulsavtaluna, sum Havbúnaðarfelagið ger við Pál Joensen, sigur Bogi Jacobsen, formaður í Havbúnaðarfelagnum.

– Framleiðslan av laksi hevur alstóran týdning fyri føroyska útflutningin, og tað er at fegnast um, at størsta ítróttatalentið hjá okkum nú skal bera navnið »Salmon from the Faroe Islands«, sigur Havbúnaðarfelagið.

Fyri kortum vóru tvey tíðindafólk frá TV2 Sport í Føroyum og gjørdu samrøðu við Pál Joensen. Tey hildu, at søgan um Pál Joensen er sera góð og tann sannroynd, at Pál er komin so langt undir teimum avmarkaðu umstøðunum, hann hevur havt til venjing og menning, er ótrúlig.

Spurningurin er so, hvussu hetta letur seg gera. Tað má sjálvandi eitt sera stórt talent, umframt arbeiðs- og vinnaravilji til. Og tað líkist søguni hjá føroysku alivinnuni, sum við sera miðvísum arbeiði er komin í ta støðu, at kunna kalla seg heimsins dugnaligastu alivinnu.

### Longur fram

– Føroyskur laksur er ein sunn og góð matvøra, og Havbúnaðarfelagið kann ikki finna ein betri ambassadør fyri føroyskan laks enn Pál Joensen, sigur Bogi Jacobsen.

Aðrar líkheitir eru – eins og Pál Joensen svimur laksur eisini og konditiónsfaktorurin hevur nógv at siga fyri úrtøkuna. Eins og Pál Joensen er føroyska alivinnan millum tær fremstu í heiminum, og føroyskur laksur er og vil verða besti laksur í heiminum. Eins og Pál Joensen kennir alivinnan til tað harða, miðvísa arbeiðið, sum skal til fyri at koma á ovastu rók.

– Pál Joensen er uttan iva Føroya størsta ítróttatalent og heldur føroyska alivinnan, at tað er sera umráðandi, at hann fær møguleikan til at menna síni góðu evni enn meira. Peningur skal til, og alivinnnan er sera fegin og stolt av at vera við til at hjálpa Pál Joensen við at koma enn longur. Tað gera vit við hesi avtaluni um at verða høvuðsstuðul komandi árið, sigur Bogi Jacobsen.

Pál Joensen sjálvur fegnast sjálvandi eisini um avtaluna og heldur tað verða hugaligt, at tað hesaferð er onkur, sum hevur við tað váta elementið at gera, sum er høvuðsstuðul.